# Býráðið steðgar nú rasarakoyringini

**Tórshavnar Býráð hevur nú tikið stig til at steðga skilaleysu koyringini í miðbýnum í Havn. Mikukvøldið var farið undir at gera vegbungur við Café Nátúr**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Fyrsta stigið er nú tikið til at steðga skilaleysu koyringini í Havn. Býráðið er farið at gera vegbungur á Havnargøtu og á Áarvegnum við Café Nátúr*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Eg havi valt at handla beinanvegin. Tað nyttar einki bara at tosa um tingini. Tað vísir seg, hvørjaferð ein ferðsluvanlukka er hend, so verður nógv skrivað og tosað. Men tað nyttar einki, um vit ikki eisini handla!

Soleiðis sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, eftir eitt ferðsluóhapp mánanáttina sum stóðst av vitleysari koyring. Tveir bilar kappkoyrdu inn eftir Havnargøtu. Tá teir komu inn móti Café Nátúr, valdi annar bilførarin at koyra niðan eftir Áarvegnum, har ferðslan er einsrættað omaneftir – og har rendi hann frontalt saman við ein mótkoyrandi bil.

– Hatta var jú púra ørt. Vit kunnu bara ímynda okkum, um tað vóru fólk til gongu, súkklu ella prutli, sum komu omaneftir, sigur Heðin Mortensen, sum vil gera nógv fyri at steðga slíkari koyring.

– Eg leggi so einki í, um hetta kanska er ein óopuler avgerð, sum onkur fer at illneitast inná. Fyri meg hevur tað størstan týdning, at trygdin verður sett í hásæti – og at vit steðga hesari vitleysu koyringini.

Borgarstjórin leggur kortini afturat, at hann eisini kundi ynskt sær størri eftirlit við ferðsluni. Hann hevur tosað við politiið um hetta, og tiltøk verða sett í verk aðrastaðni við seinni, sigur hann.

– Vit skulu sjálvandi vera varin, so vit ikki enda sum ein politistatur, men veruleikin er bara tann, at ov nógvir ferðslusyndarar eru, og teir skulu steðgast. Tað er fornuftin, sum má ráða, sigur borgarstjórin.

Mikukvøldið varð so farið undir at gera eina vegbungu út fyri handiln hjá Niels L. Arge á Kongabrúnni, har gonguteigurin er. Júst har, sum hesin gonguteigur er, koyra bilarnir mangan so skjótt, at fólk við barnavognum mangan mugu renna undan bilunum – eisini á alljósum degi.

Eisini verður ein bunga gjørd oman fyri Café Nátúr á Áarvegnum.

# - Bungurnar raka tey óseku

**- Sum borgari í Havn og sum koyrilærari eri eg ikki fegin um uppsetingina av slíkum bungum, sigur Hans J. Hermansen.**

FERÐSLUBATI
*Snorri Brend*

**Havn:** – Eftir míni meting raka hesar bungurnar tey 99 prosentini, sum koyra við skili, og ikki teir fáu sum koyra skilaleyst, sigur hann.

Hans J. Hermansen sigur í stuttari viðmerking, at tað eru aðrir mátar enn bungur at forða slíkari koyring.

Verður gongdin ov nógv í sama anda, so endar alt bara við forboðum og forðingum í ferðsluni.

Nú nýggjar bungur vórðu settar upp í Havn í gjárkvøldi, at kalla í skundi eftir ferðsluóhappið um vikuskiftið.

### Frálæra og revsing

Hans J. Hermansen er kortini ikki fegin um hesa loysnina, og mælir ístaðin til at ein í fyrstu atløgu kann seta upp myndatól á ávísum støðum.

– Á henda hátt kann ein fáa bæði mynd og fáa fatur á teimum sum koyra so skilaleyst, sigur hann.

Eitt annað av uppskotum hansara er at ein ger revsingina fyri slík brot á ferðslulógina munandi strangari.

Men Hans J. Hermansen vendir eisini peikifingrinum ímóti sær sjálvum og starvsfelagum sínum sum koyrilærarar.

– Vit mugu eisini gera enn meiri fyri, at frálæra okkara til tey sum taka koyrikoyrtið verður betri.

– Okkara uppgáva verður tí, í enn størri mun at fáa ein hugburð um skilagóða ferðslu lagdan niður í tey. Tað fer heilt vist at geva úrslit í framtíðini, sigur koyrilærarin Hans J. Hermansen.





**Starvsfólk**
TIL PERLUNA Í SMS

**Fulla tíð**

Søkt verður eftir fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.

Vit gleða okkum at hoyra frá tær...



Send umsóknina til:
Perlan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

Perlan